# Jákup og Árni Gautur fáa sama skoðsmál




*Lokalblaðið í Molde sigur seg vera væl nøgt við avrikið hjá nýggja málverjanum hjá Molde, Jákup Mikkelsen, í fyrsta dysti hansara fyri felagið*

*Mynd: Kjell Langmyren*

**Brøndby venjarin heldur, at Molde hevur ikki fingið ein góðan málverja, og fyrrverandi norski landsliðsvenjarin ivast framvegis í dygdunum hjá føroyska málverjanum**

Tað er ikki eiti á, at norskir fjølmiðlar teir seinastu dagarnar hava gjørt nógv burturúr, at Jákup Mikkelsen er vorðin málverji hjá Molde.

Spurningur hevur verið settur við, um Jákup Mikkelsen hevur verið nóg góður til bestu norsku deildina. Málverjin er meiri í andglettinum enn nakar annar spælari. Hann verður alla tíðina vigaður, og eitt lítið málverjumistak kann hava ógvusligar fylgjur.

Í Molde er Romsdals Budstikke stóra lokala blaðið. Blaðið kemur út hvønn dag í umleið 20.000 eintøkum. Teir hava gjørt nógv burturúr nýggja málverjanum. Leygardagin høvdu teir stóra frásøgn, har teir høvdu fingið føroyska málverjan út at sigla við sær, og rímuligt varð skrivað um, hvussu føroyingar ofta flóta og so víðari.

Á Romsdals Budstikke siga teir seg vera væl nøgdar við avrikið sunnukvøldið hjá nýggja málverjanum, men teir halda, at tað er ov tíðliga aftaná ein dyst at gera av, um Molde hevur fingið ein góðan málverja.

– Men vit kunnu ikki rokna við øðrum. Talan er um málverjan, sum stóð við endan, tá Herfølge fyri einum ári síðani vann danska meistaraskapin. Tað megnar tú ikki, um tú ikki hevur ein góðan málverja, siga teir lokala blaðnum í Molde.

### Hareide tummulin niður

Tá tað var greitt, at Jákup Mikkelsen skuldi spæla við Molde, setti onkur norskur fjølmiðil seg í samband við Brøndby venjaran Åge Hareide. Hann er norðmaður, og ivaleyst hava norsku fjølmiðlarnir hildið hann vera tann rætta at meta um dygdirnar hjá fyrrverandi Herfølge málverjanum.

Hareide man hava hugsað meiri um avrikini hjá Jákupi tað seinasta hálva árið í Herfølge, enn hann hevur hugsað um støðið, sum hann hevði, tá Herfølge vann meistaraskapin. Í hvussu so er var svarið hjá honum, at nú hevði Molde fingið ein vánaligari málverja, enn teir høvdu, tá Morten Bakke, sum nú er í Vålerenga, vardi málið.

Undir dystinum sunnukvøldið minti frásøgumaðurin aftur og aftur viðmerkjaran Egil Drillo Olsen á útsøgnina hjá Brøndby venjaranum. Egil Drillo Olsen var norskur landsliðsvenjari í nógv ár. Millum annað hevði hann ábyrgdina, tá Noreg í 1992 á heimavølli í vinardysti vann 2–0 á Føroyum og tá Noreg í 1993 vann 7–0 á Svangaskarði.

Egil Olsen var ikki serliga avgjørdur, tá hann metti um avrikið hjá Jákupi Mikkelsen. Hann rósti honum fyri tryggleika í flestu støðunum. Málið helt hann ikki, at málverjin kundi lastast fyri, men hann segði samstundis, at tað kemur fyri, at málverjar megna at bjarga í sovornum støðum. Tá Jákup í 2. hálvleiki misti eitt høgt innlegg afturum seg, metti fyrrverandi norski landsliðsvenjarin, at talan var um eitt mistak, og hann segði seg ivast í, um málverjin hevði tak á støðuni, tá Jákup í 1. hálvleiki ikki tveitti seg, men heldur lat eitt flatt innlegg úr vinstru fara framvið málinum.

### Á hædd við íslendska starvsfelagan

Størsta norska dagblaðið, VG, gevur øllum spælarunum karakter. Í dystinum millum Molde og Rosenborg fekk ein av liðfeløgunum hjá Jákupi eitt sjey tal. Tveir fingu fýra, tríggir fingu seks og restin fekk fimm. Jákup var millum teir tríggjar, sum fekk eitt seks tal.

Skoðsmálið hjá Jákupi Mikkelsen var tað sama, sum málverjin hjá Rosenborg fekk. Málverji hjá Rosenborg er Árni Gautur Arason. Hann er íslendskur landsliðsmálverji. Tá Ísland fyri tveimum árum síðani vann vinardyst 1–0 á Tórsvølli, var Birkir Kristinsson, sum tá var liðfelagi hjá Allani Mørkøre í ÍBV í Vestmannaoyggjunum, í málinum í 1. hálvleiki, meðan hesin Árni Gautur Arason var málverji í 2. hálvleiki. Tá var hann eykamálverji í Rosenborg. Nú hevur hann verið fyrsti málverji í eina tíð, og hann var sera tryggur sunnukvøldið.

**jh**

## Jákup stóð fyrstu royndina

**Svenski venjarin hjá Molde segði seg vera væl nøgdan, og eykamálverjin segði seg vera vónbrotnan**

Kappingin í toppítrótti er øgilig. Vinnararnir eru fáir, og tapararnir eru nógvir. Fyrr í ár hava vit fleiri ferðir nevnt, at tað var upp á tal, at Jákup Mikkelsen var á veg til FCK. Sum kunnugt, so valdi nýggi svenski venjarin hjá FCK at fara til Noregs eftir eykamálverjanum á svenska landsliðnum. Við øðrum orðum kunnu vit siga, at Jákup tapti ta kappingina.

So var tað, at Molde skuldi hava nýggjan málverja. Orsøkin var tann, at fyrsti málverjin, Morten Bakke, flutti til Vålerenga í Oslo. At besti málverjin fór úr Molde, hevði við sær, at hinir báðir málverjarnir, sum eru í felagnum, kendu, at nú høvdu teir møguleika at koma nærri besta liðnum. Felagið valdi at gera sáttmála við Jákup Mikkelsen. Og sunnudagin var tað Jákup og ikki annar av teimum báðum, sum frammanundan vóru í felagnum, og sum mettu, at nú vóru tað teir, ið áttu tørn, sum vardi málið ímóti Rosenborg.

– Eg kenni á mær, at Jákup Mikkelsen er tann besti málverjin, sum vit hava í felagnum. Tí gjørdi eg leygardagin av, at hann skuldi fáa møguleikan ímóti Rosenborg, segði svenski venjarin hjá Molde, Gunde Bengtsson.

– Eg eri vónbrotin, tí eg hevði vónað, at nú var tað eg, sum skuldi fáa møguleikan, ásannaði annar av eykamálverjunum.

Aftaná dystin helt royndi svenski venjarin, at Jákup hevði staðið royndina:

– Hann tóktist tryggur í flestu støðunum, og hann hevði í 1. hálvleiki eina framúr refleks bjarging eftir eina roynd frá Morten Knutsen, ásannaði Gunde Bengtson, sum tóktist ætla sær at hava Jákup í málinum, tá Molde mikukvøldið fer at spæla á útivølli í steypakappingini. Tann dysturin verður ímóti Bryne.

**jh**



# Bólturin rullar aftur

**Í Klaksvík varð nýggja graslíkið roynt sunnudagin, og fleiri av hinum feløgunum royndu seg í venjingardystum**




Fyri aðru ferð í tvey ár hava teir í Klaksvík tikið nýtt graslíki í brúk. Úr Klaksvík verður sagt, at teir halda seg vita við vissu, at trupulleikarnir, sum teir á tvey ára gamla graslíkinum høvdu við vatni, ikki fara at darva á nýggja graslíkinum.

Eftir talur og hornblástur vóru nógvu klaksvíkingarnir og norðoyingarnir í góðveðrinum vitni til ein fótbóltsdyst ímillum fyrst og fremst klaksvíkingar.

1. deildarliðið hjá KÍ spældi ímóti fyrrverandi 1. deildarspælarum hjá KÍ. Á hesum liðnum vóru millum aðrar Gunnar á Steig, Allan Mørkøre, Rógvi Jacobsen og Símun Eliasen, Oddbjørn Joensen og Stig Elttør.

Núverandi KÍ liðið vann 7–1. Kurt Mørkøre, sum leygardagin vandi fyrstu ferð við KÍ, skoraði trý mál. Símun Joensen skoraði tvey, og Atli Danielsen og Alexander Djordjevic skoraði eitt. Allan Mørkøre skoraði fyri fyrrverandi KÍ spælararnar.

### B36 fyrireikar seg

Sunnudagin, ólavsøkudag, skal B36 spæla finalu um løgmanssteypið ímóti KÍ.

Sunnudagin spældu teir í árstalsfelagnum síðsta vinardystin undan finaluni. Teir høvdu fingið ÍF suður á Tórsvøll. B36 vann 4–0, eftir at støðan í steðginum hevði verið 3–0. John Petersen skoraði tvey tey fyrstu málini, Magni á Lakjuni økti til 3–0 ímóti gomlu liðfeløgunum, og Heini í Skorini, sum í 2. hálvleiki hevði loyst Jákup á Borg av, staðfesti sigurin.

### GÍ framvegis í hopla

Sunnudagin var vinardystur ímillum GÍ og B68 partur av stevnuskránni í Gøtu.

Á báðum liðunum restaðu fleiri av føstu monnunum. GÍ vann 4–1. Málini hjá GÍ skoraðu Kaj Ennigarð, Omar Pálsson, Áslakur R. Petersen og Óli Hansen. Málið hjá B68 skoraði Súni Fríði Johannesen.

### U–19 á Svangaskarði

Í gjárkvøldið fór U–19 landsliðið undir venjingarlegu á Svangaskarði. Hetta er í sambandi við, at teir í august skulu til Wales.

Í kvøld skal U–19 liðið spæla ímóti GÍ í Gøtu. Mikukvøldið skulu HB og U–19 landsliðið spæla venjingardyst á Svangaskarði. Sama kvøldið fara GÍ og KÍ at spæla vinardyst á Tórsvølli.

*jh*

# Hjalgrím í Bolton

**KÍ álopsmaðurin fjalir ikki, at dreymurin hjá honum er at gera fótbóltin til livibreyð**



Ein av ungu fótbóltsspælarunum í Klaksvík er akkurát komin aftur av fótbóltsferð í Onglandi. Talan er um Hjalgrím Elttør, sum altíð hevur verið evnaríkur fótbóltsspælari. Hóast hann bara er átjan ára gamal, so hevur hann síðani í fjør verið fastur maður á besta KÍ liðnum, og hann gjørdi serliga um seg, tá KÍ fyri einum mánað síðani vann steypafinaluna hjá unglingunum á ÍF við 7–2. Ta ferðina skoraði Hjalgrím fimm mál.

Nú hevur Hjalgrím Elttør verið eina viku í Bolton, sum júst er flutt uppaftur í bestu deildina í Onglandi.

Hjalgrím hevur ikki fingið sáttmála í boði. Tað sigur hann seg heldur ikki hava roknað við:

– Tað er venjarin hjá okkum, Tomislav Sivic, sum hevur fingið samband við Bolton, og sum syrgdi fyri, at eg fekk møguleika í eina viku at uppliva, hvussu tað er at vera yrkisspælari á hægsta støði í Onglandi.

Hjalgrím Elttør dylir ikki, at dreymurin hjá honum er at gerast yrkisspælari uttanlands:

– Eg veit væl, at tað er dreymurin hjá nógvum ungum fótbóltsspælarum, og at tað er torført at koma so langt. Um tað skal eydnast, so skal hepni til, men tú ert noyddur at gera nógv við tað sjálvur, og eg vil fegin gera mín part, sigur Hjalgrím Elttør.

### Saman við kendum monnum

Hjalgrím Elttør vandi við Bolton í seks dagar. Hann vandi saman við besta hópinum, sum er mannaður við fjøruti spælarum. Millum hesar eru tríggir danir og ein íslendingur: Bo Hansen, Per Frandsen og Henrik Tømrer Petersen eru úr Danmark, og íslendski landsliðsmaðurin eitur Guðni Bergsson. Fleiri skotar eru í Bolton. Ein teirra er Colin Hendry, sum fleiri ferðir hevur spælt á skotska landsliðnum ímóti Føroyum.

– Teir fyrireika seg nú til nýggja kappingarárið. Teir gera ikki so nógv við fótbóltsspælið, sum teir gera við fysisku fyrireikingarnar. Teir venja nógv við vektum, og teir verða royndir í nógvum renningum. Eg royndi at hanga í, og tá eg fór til hús aftur, fekk eg at vita, at eg skal leggja nógva orku í fysisku venjingina.

Í síðstu viku var at síggja í donskum fjølmiðlum, at Henrik Tømrer Petersen hevði skorað bæði málini í fyrsta venjingardystinum, sum hann hevði spælt við Bolton – teir vunnu 2–0.

Nú sigur Hjalgrím Elttør okkum, at hann eisini var við í tí dystinum. Hann greiðir soleiðis frá:

– Vit spældu ímóti Bury, sum er í 2. deild. Vit spældu við trimum liðum. Øll liðini spældu ein hálvan tíma, so vórðu allir spælararnir útskiftir. Eg kom á vøllin saman við triðja partinum av hópinum. Vit fingu tvey mál, og Henrik Tømrer Petersen skoraði tey bæði.

### Avbjóðingarnar

Hjalgrím Elttør heldur, at hann varð væl móttikin í Bolton, men hann ásannar samstundis, at tað er langur vegur til at gerast yrkisspælari.

– Hjá mær ræður um at taka næstu uppgávuna, sum er á skránni, í so stórum álvara, sum tað ber til. Ólavsøkudag skulu vit í KÍ spæla steypafinalu ímóti B36, so fer landskappingin í gongd aftur, og so eru tað dystirnir við U–19 landsliðnum. Teir eri eg ógvuliga spentur upp á. Tað er eingin loyna, at landsdystirnir eru gott høvi hjá okkum spælarum at vísa fyri fótbóltsumboðsmonnum, um nakar dugur er í okkum.

U–19 landsliðið skal spæla tveir venjingardystir í Wales í aðru vikuni eftir ólavsøku. Í oktober skulu teir til Slovenia at spæla í EM undankapping. Umframt Slovenia verða mótstøðuliðini Skotland og Grikkaland.

*jh*

# Brøndby var flúgvandi

**Superligan: Vantaða grannastríðið um meistaraskapin tykist fara at vera øgiligt**

Í Brøndby hava teir seinastu tíðina aftur og aftur sagt, at teir eru troyttir av at vera settir í skuggan av FCK. Nú ætla teir at lyfta seg uppaftur á toppin, og avrikið í fyrsta umfarinum í nýggju superliguni boða frá, at tað eru meiri enn orð aftanfyri ætlanina.

Brøndby hevði vitjan av AGF. Í fjør spældu somu feløg á sama vølli í fyrsta umfarinum. Tá vann AGF 3–1. Hesa ferð var eingin ivi. Ellivu túsund áskoðarar vóru vitni til ein fínan fótbóltsdyst. AGF royndi serliga í 1. hálvleiki at gera góða mótstøðu, men heimamenninir høvdu so stóra úrtøku burturúr møguleikunum, at spenningurin var burtur, tá tað var hálvleikt.

Peter Madsen, sum hevur verið skaddur í meiri enn eitt hálvt ár, hevur fingið uppgávuna at lyfta arvin eftir málslúkin Peter Granlund, sum er farin til týskan fótbólt. Og hetta tóktist ikki nerva álopsmannin, sum skoraði bæði til 1–0 og 3–0. Brøndby vann 5–0.

Silkeborg, sum hevur mist fleiri lyklaspælarar, hevði vitjan av AB, sum eisini hevur mist nakrar av sínum bestu monnum. Dysturin endaði 1–1. Fyrrverandi liðfelagin hjá Jákupi Mikkelsen í Herfølge, Jesper Falck, legði AB framum í 11. minutti. Seks minuttir fyri leiklok javnaði Iddi Alkhaug, sum Silkeborg akkurát nú hevur keypt frá Esbjerg.

Í Vejle vísti uppflutta heimaliðið leingi stórspæl. Teir vóru frammanfyri 2–0, tá tað restaði eitt korter, men so kortsluttaði hjá teimum, og í einum og sama minutti eydnaðist tað Lyngby at skora tvey mál, so úrslitið gjørdist 2–2.

Dysturin ímillum OB og Esbjerg var útsettur. AaB og FCM skuldu spæla í gjárkvøldið.

Næsta umfarið verður á skránni komandi vikuskifti. FCK hevur aftur heimavøll. Tá verður mótstøðuliðið Vejle.

*jh*